## Misnøgd við Aleqa Hammond

Í Grønlandi er fiski- og veiðimannafelagið KNAPK sera misnøgt við, at Aleqa Hammond, landstingslimur hjá Siumut, hevur lagt fiskimenninar undir grenj. Tað orðið brúkti hon, tá fiski- og veiðimannafelagið boðaði frá, at tað tekur undir við teimum fiskimonnunum, sum hava kravt endurgjald, tí Royal Greenland hevur gjørt av at lata fleiri av teimum smáu landingarstøðunum aftur. Formaðurin í KNAPK, Leif Fontaine, segði um vikuskiftið, at Aleqa Hammond nýtist ikki at hugsa um, hvussu hon skal fáa løn, og so eigur hon at minnast til, at fiskimenninir eru við til at útvega henni lønina.



## Fogh millum teir bestu

Anders Fogh Rasmussen bleiv dúgliga róstur, tá hann legði frá sær sum formaður í Vinstra í gjár eftir at hava verið formaður í níggju ár. Lars Løkke Rasmussen, sum fyrst tók við sum forsætisráðharri og í gjár sum formaður í Vinstra, segði í røðu síni á landsfundinum, at Anders Fogh Rasmussen er ein tann besti forsætisráðharrin, sum Danmark hevur havt og ein tann mest virdi Vinstra-formaðurin nakrantíð. Nýggi formaðurin rósti millum annað undanmanninum fyri avrikið, tá hann var formaður í ES, og hvussu hann handfór kreppuna av Muhammeds-tekningunum.

# Tríggir ungar í Clinton-reiðrið

**Stór var gleðin, tá fólk sóu tríggir smáir ungar í tjaldursreiðrinum uttan fyri Clinton-svituna á Hotel Føroyum um vikuskiftið. Eitt vevmyndatól sendir myndir av tjaldursreiðrinum beinleiðis út á internetið, har fólk kunnu fylgja við**

TJALDURS-LIVE

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið fekk tjaldursparið á Hotel Føroyum tríggjar smáar ungar. Enn er eitt egg eftir í reiðrinum.

Tann 26. apríl skrivaði Portalurin, at eitt tjaldur aftur í ár hevur bygt sær reiður uttan fyri Clinton-svituna á Hotel Føroyum.

Eitt vevmyndatól stendur soleiðis, at til ber at eygleiða gerandisdagin hjá tjaldursfamiljuni.

Tólið tekur nýggja mynd hvørt 5. sekund og liggur undir teiginum "vevmyndir" á Portalinum.

Fleiri fólk hava sent Portalinum myndir av tjaldursungunum, sum komu úr reiðrinum uttan fyri Clinton-svituna í leygardagin. Men, sum vera man, verða smáu tjaldursungarnir væl vardir av foreldraparinum. Tí ganga eisini langar løtur ímillum, at vit sleppa at síggja ungarnar. Hetta er bara, tá mamman og pápin skiftast um at leggja seg á reiðrið.

Men Portal-lesarar hava tíbetur ómakað sær við at goyma myndir av ungunum, tá teir eru komnir til sjóndar, og hava sent tær til Portalin.

Jóhannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum, sigur, at tað er ómetaliga hugaligt at eygleiða tjaldursfamiljuna. Og nú veðrið batnar og ungarnir eru komnir, fara tey helst at seta eitt betri myndatól upp uttandura. Higartil hevur tólið staðið inni, og tí hevur myndagóðskan ikki verið so góð.

Tjaldursungar halda ofta til í grýtutum lendi, har teir verða væl kamufleraðir. Uttan fyri Clinton-svituna á Hotel Føroyum er lendið grýtut við skervi, sandi og skeljum av ymsum slag. So har er gott at krógva seg hjá smáu tjaldursungunum. Tí, sum Jóhannes Jensen sigur: Nú vóna vit bara ikki, at líkkurnar taka ungarnar.

Eisini í fjør reiðraðist eitt tjaldurspar uttan fyri vindeygað í Clinton-svituni, og vakti tað sera stóran ans bæði her á landi og uttanlands. Tá fekk parið trý egg og seinni tríggjar tjaldursungar, og búðu familjan á hotellinum nærum alt summarið. Óvist er, um tað er sama par, sum hevur sett búgv á staðnum í ár. Eisini gjørdu nógv fólk vart við seg tá, og brøv komu úr Týsklandi, Noregi og Danmark, umframt frá fuglavinum og øðrum áhugaðum úr Føroyum.



*Nú veðrið batnar og ungarnir eru komnir, fara tey á Hotel Føroyum helst at seta eitt vevmyndatól upp uttandura, so myndagóðskan verður betri.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### VISTI TÚ?

Tjaldrið (Haematopus ostralegus) er 45 cm til longdar, og er at síggja alt summarið í Føroyum. Tjøldrini koma til landið umleið 12. mars, og sagt verður, at tey hava fult reiður tann 3. mai. Eitt tjaldursreiður er ein lítil kulla, ið kann verða klødd innan við smásteinum og skeljum. Eggini eru gulbrún við myrkabrúnum plettum og strikum, og tey eru uml. 57 x 40 mm til støddar. Ungarnir klekjast eftir 25 døgum. Tjaldrið er ein av teimum fáu vaðfuglunum, ið fóðrar ungar sínar. Tá foreldrafuglurin t.d. hevur fangað ein maðk, verður hann lagdur frammanfyri ungan, sum so etur hann. Ungarnir halda ofta til í grýtutum lendi, og har eru kamoflasjulitirnir hjá ungunum tann besta verjan.

*Kelda: Wikipedia*

# Javni kempar víðari

**Týsdagin verður aðalfundur í Javni. - Tíbetur eru fleiri sigrar at fegnast um, sigur Óli Wolles, formaður, undan aðalfundinum**

VÆLFERÐ

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Týskvøldið hevur Javni aðalfund í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Á skránni er millum annað val av tveimum nevndarlimum, og so fara Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, og Maud Wang Hansen, leiðari á Verkstaðnum Vón, at tosa um evnið: "Virkin gerandisdagur - virðismikil menniskju".

Óli Wolles, formaður í Javni, sigur við Sosialin, at felagið hevur fleiri sigrar at fegnast um, nú aðalfundurin stendur fyri framman.

Eitt nú nevnir hann sonevndu Verjulógina, sum Løgtingið samtykti í farnu viku.

- Nú hava vit stríðst og jabbað um hesa lógina í eini 6-8 ár, so tað er ein stórur sigur, at vit fáa hana í hús, sigur Óli Wolles við Sosialin.

Verjilógin tryggjar fólki við breki og øðrum, sum hava tørv á verju, at fáa ein hjálparverja, uttan, at tey tó nýtast at verða ómyndiggjørd. Higartil hevur tað verið soleiðis, at fólk antin vóru myndug ella ómyndug, og sostatt mistu øll síni borgarlig rættindi.

- Nú kunnu tey fáa hjálp eftir tørvi, uttan at missa onnur borgarlig rættindi. Tað er eitt ómetaliga stórt framstig. Til dømis kann ein avvarðandi ella onkur annar, sum brúkarin hevur álit á, fáa formligan myngdugleika at vegleiða og at tala teirra søk í viðurskiftum, sum tey ikki sjálvi megna at umsita. Men uttan at tey missa borgarligu rættindini, so sum valrætt og annað, greiðir hann frá.

### Líka kor fyri allar borgarar

Eitt annað mál, sum Javni frøist um, er, at ST-sáttmálin um rættindi hjá einsktaklingum, ið bera brek varð einmælt samtyktur í Tinginum mikudagin.

- Hesin sáttmálin hevur sera stóran týdning fyri okkara brúkarar. Tí hann útgreinar, hvussu eitt land ítøkiliga skal gera, fyri at vanlig mannarættindi eisini skulu koma at fevna um tey, sum bera brek, sigur Óliv Wolles, og vísir millum annað til trupulleikan við atkomu til bygningar, skúlaviðurskifti og borgarlig rættindi fyri fólk við breki.

- Sáttmálin útgreinar, hvussu vit sum samfelag tryggja teimum, sum bera brek, betri sømdir, so teirra livikor verða javntstillað við tey, sum ikki bera brek, sigur Óli Wolles, sum staðfestir, at her hjá okkum er tað serliga á skúlaøkinum, at langt er eftir á mál. Men eisini tá tað snýr seg um verju og kor á arbeiðsmarknaðinum.

Ein arbeiðsbólkur hevur gjøgnumgingið alt lógarverkið hetta seinasta árið. Í arbeiðsbólkinum sat millum annað Laila Solmunde, forkvinna í MBF.

### Bústaðir í tøkum tíma

Sambært Óla Wolles, er enn ein sigur komin í hús við bústaðarpakkanum, sum Hans Pauli Strøm tók stig til, og sum Rósa Samuelsen nú hevur borið í Tingið. Hann fer at lata upp fyri nýggjum bústaðarmøguleikin til fólk við serligum tørvi. Eitt nú kunnu felagsskapir sum Javni seta sjálvsognarstovnar á stovn, sum kunnu byggja bústaðir til fólk.

- Vit kundu hugsað okkum at gjørt tað í samstarvi við nakrar kommunur. Men fyrst mugu vit fáa ein fíggingarleist, til dømis sum tann, sum verður brúktur, tá røktarheim verða bygt. So tað verður næsta málið vit fara at arbeiða við, sigur Óli Wolles.

Formaðurin í Javni er sum sagt mest nøgdur við avrikini, sum eru framd í ár. Tó er eitt mál, sum felagið harmast almikið um. Tað er í sambandi við, at lønarafturberingin til fólk, sum eru heima við illa sjúkum børnum, verður skerd, so loft verður sett á upphæddina. Her er talan um børn, sum onki annað tilboð faa frá tí almenna, og tí noyðist annað foreldrið heim at ansa barninum.

- Og hevði tað so ikki verið við so stuttum skotbrái, sigur Óli Wolles, og vísir á, at lógin kemur í gildu longu 1. juli, og tí fáa fólk ikki tíð at umstilla seg til nýggju treytirnar.